# Ætlaða vatnorku-útbyggingin hjá SEV


Av heimasíðuni hjá SEV

POUL HANSEN



Tá SEV hevur turrlagt allar áirnar á norður- vestursíðuni á Eysturoy, eru 3 vatnorku útbyggingar fyri framman hjá SEV.

Tær eru:

1. Dalar norðanfyri Vestmanna
2. Víkavatn v.m.
3. Eystursíðan á Vágoynni

Í Sosialinum 20/6-2008 og 23/1-2009 hevur undirritaði viðgjørt ávikavist nr. 1 og 2.

Hesaferð verður hugt nærri at tí partinum av ætlanini í Vágum, sum fevnir um tær áir, sum renna vestureftir í Fjallavatn og Sørvágs/Leitisvatn.


*Bøsdalafossur hvørvur*
*Mynd: Ólavur Frederiksen*

**Byrging í Tjørnudali**

Ætlanin er at savna allar áir og áarløkar í fjallalendinum norðan fyri Háls í Sandavági millum Vestmannasund og Fjallavatn, Sørvágs/Leitisvatn og leiða tær í eina byrging, sum verður gjørd í Tjørnudali.

Haðani verður tunnil gjørdur til eina kraftstøð millum Fútaklett og Oyragjógv.

Í byrgingina í Tjørnudali skal leiðast alt vatn, sum rennur í Ánni í Rók, Tjørnudalsá, Kvíandalsá og Grótvalá.

Hesar 4 áir – eru áirnar, ið renna í Sjatlá, sum rennur gjøgnum Vatnsoyrar og sum er høvuðsáin, ið rennur í Sørvágs/Leitisvatn.

**Bøsdalafossur hvørvur**

Tá hesar áir verða turrlagdar minkar vatntilføringin í Sørvágs/Leitisvatni við meir enn 3/4 og tað merkir so aftur, at Bøsdalafossur hvørvur og at Sørvágs/Leitisvatn verður eitt deyðavatn og kann tí neyvan brúkast til drekkivatn.

**Reipsáfossur hvørvur**

Norðanfyri verða Tunguáin og Áin á Fjøllum, sum renna í Fjallavatn, bendar í byrgingina í Tjørnudali.

Ein partur av avfallsøkinum hjá Botnánni verður eisini tikin, soleiðis at hon minkar munandi.

Tá Tunguáin og Áin á Fjøllum verða turrlagdar og Botnáin minkar munandi minkar vatnið, ið rennur í Fjallavatn við meira enn helminginum.

Reipsá, sum er einasta á, ið rennur úr Fjallavatni, minkar somikið, at Reipsáfossur - ein av vakrastu fossum okkara – hvørvur.

**Hví?**

Grundgevingarnar hjá SEV fyri at byggja vatnorkuna út, er at gera


*Tunguáin - turrløgd*


*Tjørnudalsáin – turrløgd*


*Í Tjørnudali skal høg byrging gerast og stórur partur av dalinum setast undir vatn*